# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



6. apríl fekk Mirjam eina lítlasystur. Hon vigaði 4000 g og var 54 cm long. Foreldrini eita Unn og Petur Martin Glerfoss, Keypmannahavn.

15. apríl fingu Jansy Elisabeth Joensen og Hendrik Thomsen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2650 gr.

17. apríl fingu Sólrun Hansen og Jakob Kofoed, Velbastaður, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3600 gr.

18. apríl fingu Jórun og Egil Sondum, tvíburar, gentu og drong á Ríkissjúkrahúsinum.

18. apríl fingu Dorit og Jákup Eli á Lava, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3900 gr.

20. apríl fingu Turið og Rasmus Magnussen tvíburar, 2 gentur. Onnur var 49 cm. long og vigaði 3050 gr. og hin var 48 cm. long og vigaði 2800 gr.

21. apríl fingu Charlotta Nielsen og Jàkup Dam, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 3400 gr.

21. apríl fingu Eydna og Kári Johansen, Haldórsvík, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 3770 gr.

21. apríl fingu Maria Jumia Da Silva og Hilmar Simonsen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3600 gr.

Bettina og Jóhan Toftegaard, Fuglafjørður hava fingið eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3185 gr.

24. apríl fingu Hildur Steingrímsdóttir og Sigurð Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3350 gr.

24. apríl fingu Ranvør og Páll Isholm, Syðrugøta, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3650 gr.

24. apríl fingu Elin og Tór-Ingar Akselsen, Sandavágur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4100 gr.

25. apríl fingu Joan og Jógvan J. á Hædd, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3650 gr.

27. apríl fingu Conny og Johnny Thomassen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3700 gr.

**Merkisdagar**
**Prógv**
Berit Hovsgarð, Hovi hevur hin 6. apríl tikið prógv sum skipsjef (skipsførari, maskinmeistari og el-installatør) frá Simac í Svendborg.

Jóhannes Miðskarð, Klaksvík, hevur á Danmarks Pædagogiske Universitet, Emdrup, tikið prógv sum Cand. Pæd. í námsfrøðiligari sálarfrøði.

**Brúdleyp**
Leygardagin 29. apríl 2006 kl. 16.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Janet Skarðsá Jacobsen, Fuglafjørður, og Rune Nørregaard Pedersen, Fyn. Veitsla verður fyri innbodnum á Muntra kl. 19.00.

Leygardagin 29. apríl kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Rúna Axelsdóttir Skoubo og Hjarnar Krog Dalsgaard. Veitsla verður fyri innbodnum í B36 húsinum kl. 19.00.

## Minningarorð um Sigurður Breiðfjørð Halldórsson



Páskadag, tann 16. apríl 2006, andaðist Sigurður Breiðfjørð Halldórsson, 92 ára gamal. Bert fáar vikur frammanundan var hann her í Føroyum og vitjaði okkum, og tá tyktist hann vera rættiliga byrgur, hóast sín høga aldur. Kortini mundi hann kenna á sær, hvønn veg tað bar, tí hann hevði ikki lætt við at siga farvæl, tá vit fylgdu honum til flogvøllin aftaná sína seinastu vitjan hjá okkum, hann visti helst, at nú var fjørðurin skjótt rógvin.

Siggi var vestfirðingur, ættaður av Rauðasandi. Hann var ættkærur maður, og honum dámdi væl at greiða frá sínum ættfólki. Sum frásøgumaður var hann framúr góður, mangar eru tær løturnar, tá vit sótu og lurtaðu, meðan hann greiddi frá, ikki minst, tá hann kom inn á sínar barndómsdagar og ungdómsár fyri Vestan. Tað sást týðiliga, at hann mintist aftur á teir dagarnar við gleði, hóast hann mangan hevði tað strævið, tá hann – sum vanligt var í tí tíðini – mátti gera vaksnamannaarbeiði, frá tí at hann var so frægur.

Somuleiðis kundi hann at kalla rúnarbinda okkum, sum lýddu á, tá hann fortaldi um nógvar ymiskar hendingar, honum høvdu verið fyri í hansara langa lívi. Hann hevði eitt ótrúliga gott minni, mintist hendingarnar niður í minstu smálutir, og hetta saman við sínum viðføddu evnum at gera frásagnirnar so livandi, at vit at kalla sóu hendingarnar fyri okkum, gera hesar løturnar ógloymandi. Tíbetur er meginparturin av frásøgnunum festar á band, og harvið hevur Siggi latið ein varða eftir seg til stóra gleði fyri sínar eftirkomarar.

Minnist, tá eg á fyrsta sinni kom á dyr hjá teimum Sigga og Mariu. Mundi helst vera eitt sindur fjálturstungin, sum vanligt er hjá einum unglingi, ið fyrstu ferð skal heilsa uppá síni verforeldur. Men beinanvegin kendi eg á mær, at einki var at óttast fyri, við síni náttúrligu medferð og viðfødda gestablídni greiddi hann á ein púra náttúrligan hátt ta torføru uppgávu at fáa henda smædna dótturmannin at kenna seg heima frá fyrsta degi. Hesin vinskapur, sum tók seg upp okkara millum, helt sær til hansara doyggjandi dag, ongantíð hoyrdi eg øvugt orð frá honum, tvørtur ímóti sýndi hann, hvørja ferð høvið beyðst, hvussu høgt hann metti okkara vinalag.

Sigga dámdi væl at koma til Føroya á vitjan, serliga tey seinnu árini høvdu vit bæði Elsa tað stóru gleði at fáa vitjan av honum rættiliga tíðum, ofta hevði hann á orði, at hann metti Føroyar sum sítt annað heimland. Saknurin verður stórur, nú hann hevur verið á síni seinastu vitjan, tómligt verður at koma í heimið á Blómsturvøllum, nú bæði Maria og Siggi eru farin. Men minnini liva eftir, og lati okkum varðveita tey til teirra æru.

Friður veri við minninum um Sigurð Breiðfjørð Halldórsson.

**Elsa og Kristian**

## Nýggjur trivnaðarstjóri í Havn

**42 ára gamla Ingibjørg Berg er sett í starv sum trivaðarstjóri hjá Tórshavnar Kommunu**

*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Ingibjørg Berg tók prógv sum stjórnmálafrøðingur við lærda háskúlan í Århus í 1993 og hevur síðani millum annað útbúgvið seg innan leiðslu og sálarfrøði. Hon hevur altíð starvast innan fyrisitingarliga økið, eitt nú á Fróðskaparsetrinum, á Løgmansskrivstovuni og í Oljufyrisitingini. Í løtuni er Ingibjørg Berg aðalskrivari hjá Kommunusamskipan Føroya.

Ingibjørg tekur við starvinum í Tórshavnar Kommuni 1. juni og kemur at umsita einar 250 mill. krónur til trivnaðarøkið, sum fevnir um Sosialu deild, Mentamáladeildina og Barna- og ungdómsdeildina.





Øllum tykkum sum á ymiskan hátt mintust meg á 80-ára føðingardegnum tann 13. apríl 2006 takki eg hjartaliga.

Vinarligar heilsanir
*Gigga Joensen*

**Dagurin**

**29. apríl. Pætur blóðvitnismaður**, deyður í 1252. Dagurin hevur navn eftir einum dominikanamunki, sum varð myrdur av fíggindum í Milano.

**30. apríl. Severus.** Var í fimtu øld biskupur í Napoli.

**1. mai. Valborgarmessa.** Hildin til minnis um enska kongsdóttur og nunnu, sum seinni gjørdist abbadissa í kleystrinum Hildesheim í Týsklandi. Hon doyði í 779. Valborgarnátt varð hildin mikil várveitsla í Norðurlondum, og tað er ta náttina, at trøllkonur ríða at Bloksbjørgum. Germanskt navn, ið merkir vald og vernd. 1. mai er arbeiðaradagurin, sum varð hildin á fyrsta sinni í París í 1889.